Veiðugjøld LM-056/2025

Føroya Fiskimannafelag tekur ikki undir við, at enn meira verður lagt á vinnuna. Hetta er tí, at Føroya Løgting, hevur í síni tíð, brotið inn í sáttmálan millum manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag.

Hvørja ferð løgtingið hækkar eitt avgjald fisk, fáa fiskimenn eina eykarokning frá Føroya Løgtingið.

Føroya Løgting tekur við hesum, meira frá verkamanninum, og tað halda vit ikki hóskar einari samgongu, sum sigur seg vera arbeiðaravinarliga.

Føroyskir fiskimenn gjalda nógv meira í skatti og avgjøldum, enn hinir starvsbólkarnir. Hetta uttan at hava stórvegis vernd í lógávuni eins og nógvir starvsbólkar hava.

Tí verður heitt á løgtingið og landstýrið, um ikki at leggja uppskotið fram í óðum verkum. Vænti og vóni ikki, at hetta er meint sum ein eykaskattur, til ein útvaldan verkamannabólk.

Takið tí uppskotið aftur.

Jan Højgaard

Føroya Fiskimannafelag